# 94 fólk bjóða seg fram til fólkatingsvalið

**34 kvinnur og 60 menn bjóða seg fram at umboða Føroyar á danatingi eftir valið annan týsdag. Tjóðveldisflokkurin og Javnaðarflokkurin hava fulla javnstøðu á listunum**

FÓLKATINGSVAL

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Vánaligastu javnstøðuna á listanum hevur Sambandsflokkurin, meðan Tjóðveldisflokkurin og Javnaðarflokkurin hava fulla javnstøðu. Tjóðveldisflokkurin stillar upp níggju av hvørjum kyninum, meðan Javnaðarflokkurin stillar upp 11 av hvørjum kyni.

Hjá Fólkaflokkinum eru tølini 14 menn og 5 kvinnur. Tað merkir, at 74% av valevnunum eru menn, meðan 26% eru kvinnur.

Sambandsflokkurin hevur 17 mans og fimm kvinnur. Tað er 77% menn og 23% kvinnur.

Sjálvstýrisflokkurin hevur einans trý valevni, eina kvinnur og tveir menn. Har eru prosentini ávikavist 33 og 67.

Miðflokkurin stillar upp tríggjar kvinnur og sjey mans. Tað er 30 kvinnur og 70% menn.

Tilsamans verður javnstøðan tískil: 36% kvinnur og 64% menn. Verður hetta lutfallið til komandi løgtingsval – og veljararnir hava somu uppfatan av javnstøðu, sum føroysku politisku flokkarnir, so skulu 12 kvinnur og 21 menn manna komandi løgting. Hóast hetta er langt frá fullari javnstøðu, so er tað kortini ein framgongd...

**Fólkaflokkurin:**

| | | |
|---|---|---|
| Menn: | 14 | 74% |
| Kvinnur: | 5 | 26% |

**Sambandsflokkurin:**

| | | |
|---|---|---|
| Menn: | 17 | 77% |
| Kvinnur: | 5 | 23% |

**Javnaðarflokkurin:**

| | | |
|---|---|---|
| Menn: | 11 | 50% |
| Kvinnur: | 11 | 50% |

**Sjálvstýrisflokkurin:**

| | | |
|---|---|---|
| Menn: | 2 | 67% |
| Kvinnur: | 1 | 33% |

**Tjóðveldið:**

| | | |
|---|---|---|
| Menn: | 9 | 50% |
| Kvinnur: | 9 | 50% |

**Miðflokkurin:**

| | | |
|---|---|---|
| Menn: | 7 | 70% |
| Kvinnur: | 3 | 30% |

## Listarnir síggja soleiðis út:

**Fólkaflokkurin:**
*Johan Sølvi Andreasen, Vágur*
*Óli Breckmann, Argir*
*Hanna Dalsenni, Klaksvík*
*Bjarni Djurholm, Hoyvík*
*Tummas í Garði, Tórshavn*
*Niels Pauli Hammer, Hvalba*
*Anna Krog Hentze, Sandur*
*Hanna Jensen, Norðragøta*
*Kjartan Joensen, Leirvík*
*Jógvan á Lakjuni, Fuglafjørður*
*Poul Michelsen, Tórshavn*
*Jákup Mikkelsen, Klaksvík*
*Bjarti Mohr, Tórshavn*
*Jørgen Niclasen, Sørvágur*
*Rodmundur Nielsen, Glyvrar*
*Annika Olsen, Tórshavn*
*Malena Thomsen, Innan Glyvur*
*Jacob Vestergaard, Akrar*
*Heðin Zachariasen, Streymnes*

**Sambandsflokkurin:**
*Helgi Abrahamsen, floksskrivari, Strendur*
*Svenning Borg, sjómaður, Vágur*
*Annfinn Brekkstein, stjóri, Velbastaður*
*Johan Dahl, løgtingsmaður, Vágur*
*Marjus Dam, løgtingsmaður, Miðvágur*
*Erikka Elttør, krambakvinna, Klaksvík*
*Olav Enomoto, løgtingsmaður, Vestmanna*
*Edva Jacobsen, bankakvinna, Fuglafjørður*
*Eivind Jacobsen, brandmeistari, Sørvágur*
*John Kári Jacobsen, skipari, Hvannasund*
*Edmund Joensen, løgtingsmaður, Oyrarbakki*
*Kaj Leo Johannesen, løgtingsmaður, Tórshavn*
*Bjørn Kalsø, landsstýrismaður, Klaksvík*
*Magni Laksáfoss, landsstýrismaður, Streymnes*
*Høgni Mikkelsen, býráðslimur, Tórshavn*
*Gunnar K. Nattestad, bankamaður, Sandavágur*
*Ingvør Nolsøe, stjóri, Tórshavn*
*Alfred Olsen, løgtingsmaður, Saltnes*
*Marjun Olsen, sjúkrahjálpari, Øravíkarlíð*
*Rósa Samuelsen, borgarstjóri, Sandavágur*
*Bjarti Thomsen, granskari, Nólsoy*
*Jaspur Vang, løgreglumaður, Tvøroyri*

**Javnaðarflokkurin:**
*1. Kirstin Strøm Bech, Skálavegur 22, 900 Vágur, borgarstjóri*
*2. Edith Dahl, Gundadalsvegur 23, 100 Tórshavn, vinnurekandi*
*3. Jóannes Eidesgaard, undir Heygnum 9, 800 Tvøroyri, løgmaður*
*4. Gudny Diana Hentze, Heimasandsvegur 14, 210 Sandur, postboð*
*5. John Johannessen, Brattabrekka 23, 100 Tórshavn, løgtingsmaður*
*6. Jónleif Johannesen, Heygavegur 23, 700 Klaksvík, lærari*
*7. Vilhelm Johannesen, Líggjasarbrekka 9, 700 Klaksvík, løgtingsmaður*
*8. Randi í Jógvanstovu, Sporamørk 20, 520 Leirvík, bygdarráðslimur*
*9. Gerhard Lognberg, 240 Skopun, løgtingsmaður*
*10. Kristian Magnussen, Dungagøta 13, 100 Tórshavn, løgtingsmaður*
*11. Heðin Mortensen, Hoyviksvegur 22A, 100 Tórshavn, borgarstjóri*
*12. Helena Dam á Neystabø, Børkugøta 29, 100 Tórshavn, stjóri*
*13. Óluvá Niclassen, á Stórheyggi 5, 176 Velbastaður, deildarleiðari*
*14. Jóngerð Nielsen, Heygalíð 15, 350 Vestmanna*
*15. Nita Næs, Nesvegur 17, 850 Hvalba, lærari*
*16. Andrias Petersen, Garðagøta 8, 510 Gøta, løgtingsmaður*
*17. Dan Reinert Petersen, Fløtugerði 21, 530 Fuglafjørður, lærari*
*18. Eyðgunn Samuelsen, Jørundsgøta 40, 700 Klaksvík, býráðslimur*
*19. Hans Pauli Strøm, Byrgisvegur 8, 355 Vestmanna, landstýrismaður*
*20. Mamy Dahl Sørensen, Hoygarðsvegur 7, 700 Viðareiði, stovnsleiðari*
*21. Mikkjal Sørensen, Heygavegur 11, 950 Porkeri, skrivstovumaður*
*22. Eileyg Weihe, Stræti 1, 380 Sørvágur, bygdarráðslimur*

**Sjálvstýrisflokkurin:**
*Sámal Petur í Grund*
*Rúna Sivertsen*
*Kári á Rógvi*

**Tjóveldi:**
*Annita á Fríðríksmørk*
*Bergtóra H. Joensen*
*Bjørt Samuelsen*
*Heidi Petersen*
*Heini O. Heinesen*
*Hergeir Nielsen*
*Høgni Hoydal*
*Jórun Høgnesen*
*Olga Biskopstø*
*Óluva Klettskarð*
*Petur í Gong*
*Róaldur Jákupsson*
*Sjúrður Skaale*
*Sólfríð Fjallsbak*
*Tórbjørn Jacobsen*
*Páll á Reynatúgvu*
*Maria Kristiansdóttir*
*Jákup Petersen*

**Miðflokkurin:**
*Arni Abrahamsen, 05.03.77, konsulentur, 666 Undir Gøtueiði*
*Karsten Hansen, 18.08.44, løgtingsmaður, Víkavegur 32, 700 Klaksvík*
*Egin Henriksen, 21.11.52, EDV programmør, Børkugøta 35, 100 Havnin*
*Frank Jacobsen, f. 21.03.67, lesandi, Áargeil 13 A, 100 Havnin*
*Mia av Kák Joensen, 04.02.57, lesandi, 380 Sørvágur*
*Bill Justinussen, f. 27.08.63, løgtingsmaður, 625 Glyvrar*
*Jaspur Langaard, 01.04.70, deildarleiðari, Gaddavegur 2, 655 Nes*
*Charlotta á Váli Olsen, 01.06.54, pædagogur, í Svanga 1, 100 Havnin*
*Hjørdis Háberg Petersen, 21.08.66, 410 Kollafjørður*
*Jenis av Rana, 07.01.53, løgtingsmaður, Sóljugøta 10, 100 Havnin*



# Lægsta talið av valevnum í 50 ár

POLITIKKUR

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Ikki síðani 1957 hava so fá valevni stillað upp til eitt fólkatingsval í Danmark. Bert 808 valevni, av teimum 260 kvinnur, royna týsdagin at vinna ein av teimum 175 fólkatingssessunum, sum eru tillutaðir dønum í Danmark.

Orsøkin til lága talið av valevnum er fyrst og fremst broyttu valdømini, sum eru fækkað úr 103 til 92. Hetta merkir, at flokkarnir stilla færri valevni upp.

Harafturat eru tað bert níggju flokkar sum stilla upp í mun til tíggju við síðsta fólkatingsval í 2005. Tá vóru 947 valevni stillað upp, meðan tað í 1957 vóru 757 valevni.

Hægsta tal av valevnum var í 1987, tá 16 flokkar stillaðu upp við 1517 valevnum.

Ny Alliance hevur flest valevni, tey hava 97, meðan Kristendemokratarnir hava lægsta talið, 77. 13 av teimum 808 valevnunum stilla upp uttan fyri flokkarnar.

Sambært danska Innanríkismálaráðnum er 32,2% av valevnunum kvinnur, ið er tað hægsta higartil. SF hevur 38 kvinnur millum tey 91 fólkatingsvalevnini.

Miðalaldurin á donsku valevnunum er 44,2 ár.

# 12 ferðir fleiri valevni enn danir

POLITIKKUR

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Til fólkatingsvalið týsdagin hava føroyingar 12 ferðir so nógv fólk í at velja, sum danir. Meðan tað í Føroyum eru 94 valevni, sum bjóða seg fram, so eru tað "einans" 808 í Danmark.

Vanliga plaga vit at falda okkara tøl við 100, tá vit skulu samanbera við danir, sum eru eitt sindur meira enn 100 ferðir so nógv fólk sum vit.

Um danir skuldu nýtt sama lutfall, so skuldu 9.400 valevni stilla upp til Fólkatingið í Danmark.

Men viðvíkjanid javnstøðu, so stendur betur til í Føroyum, tí meðan "einans" 32,2% av donsku valevnunum eru kvinnur, so eru tær 36% í Føroyum. Og tá er tað enn tá talan um met í Danmark.

Áhugavert verður at frætta, um hetta fer at síggjast aftur á valinum týsdagin – og á løgtingsvalinum í januar...